# Andlitsmáling, hoppiborg og Emma



Børnini fingu eisini høvi til at verða málað á andlitið

BARNATILTAK

Orð: Ingrid Bjarnastein
Myndir: Finnur Justinussen

Høllin var prýdd við ballónum, og runt í henni reikaðu eini 200 børn og dagrøktarar. Hetta komst nevniliga av, at dagrøktararnir í Tórshavnar Kommunu skipaðu fyri stórum tiltaki uppi í Badmintonhøllini í gjár.

Børnini sóu út til at stuttleika sær óført. Ein hoppiborg var sett upp í einum horni í høllini, og í einum øðrum stóð M´as Blues Band og sang allar sínar hit-sangir. Eisini vóru borð sett upp har tvær útklæddar konur sótu og góvu børnunum andlitsmáling – alt fyri at gera tiltaki eitt sindur hugnaligari.

Meðan Emma og hini buldraðu í horninum hoppaðu og dansaðu børnini á gólvinum. Eisini vóru tey røsk at syngja og klappa við. Og gav M´as Blues Band eisini børnunum fyrsta floks undirhald, og ikki var spart uppá luftgittaran hjá bólkinum.

Hæddarpunktið var uttan iva tá Babu fór í luftina. Øll børnini speladu yvir til tey leikandi, og hoppaðu og klappaðu so tað rungaði eftir í. Og tað er ikki heilt skeivt at siga, at tey vaksnu hugnaðu sær minst líka nógv sum børnini. Eitt tiltak, ið dagrøktarar, foreldur og børn, uttan iva kunnu vera ógvuliga glað fyri.



Børnini sótu hugtikin og lurtaðu meðan Emma og hini sungu »Babu« og allar hinar kendu sangirnar


Shetland Cruise summarið 2002 www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team85

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ... 1.149,- fyri hvønn
(í lágárstíð)



Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 746,- fyri hvønn
(í lágárstíð)



Privat gisting
úr einans ... 878,- fyri hvønn
(í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo



Bilar

Nr. 95 • hósdagur • 23. mai 2002 • 76. árg.




Bilførarin hevur eitt gott arbeiðspláss. Hann hevur gott pláss til at ganga upprættur og strekkja beinini inni í bilinum

# VR Bilar – Volvo FH12 Globetrotter XL sum framsýningarbil



VR Bilar hava fingið hendan Volvo FH 12 Globetrotter XL heim sum framsýningarbil. Torleif Nón verkførari, sýnir her bilin fram. Talan er ein væl útgjørdan bil við 500 hk, framkomnum I-shift gearkassa, leðursetrum og alufelgum

**Hjá Volvo umboðinum, VR Bilar, hava teir fingið ein Volvo FH12 Globetrotter XL forvogn sum framsýningarbil. Talan er um ein væl útgjørdan bil við 500 hk, framkomnum I-Shift gearkassa, leðursetrum og alufelgum**

BILAR

Magnus Gunnarsson

Hesin FH12 Globetrotter XL forvognurin hevur tað størsta førarahúsið, av teimum fýra støddunum, ið eru at velja ímillum. Bilførarin hevur gott pláss til at ganga upprættur og strekkja beinini inni í bilinum. Tvær koyggjur eru aftanfyri setrini. Ein rættur bilur til longri túrar.

### 500 hk og I-Shift

Motorurin er ein 12 litur 6 syl. turbocompound við 500 hk. Turbocompound aggregatið útnýttar yvirskotshitan frá útstoytinum. I-Shift er ein heilt nýggjur framkomin heilautomatiskur ella manuelt stýrdur gearkassi við heilautomatiskari koblingsfunktión.

Allir Volvo lastbilar við luftfjaðraskipan hava skivubremsur á øllum hjólunum. Eisini hava teir elektroniskt stýrdan retardara, ið kann aktiverast automatiskt, tá man bremsar og heldur ferðina, hann er settur til í undanbrekku. Við tað at ABS bremsur eru standard, hevur hesin bilurin eisini ESP (Elektronisk Stabilitet Program). Við hesi skipan fær bilførarin hjálp í torførum umstøðum. Skipanin regulerar til dømis bremsukraftina og motorkraftina eftir tørvi.



Framsýningarbilurin hjá VR Bilum hevur 2 koyggjur aftan fyri setrini. FH12 kann eisini leverast við "kontórpakka" sum her á myndini

### Leðursetur og alufelgur

Hesin FH12, sum verður sýndur fram hjá VR Bilum í hesum døgum er sera væl útgjørdur við t.d. leðursetrum og alufelgum. Bilurin er nýggjasta modell, ið fyrstu ferð bleiv sýndur fram í oktober í fjør. Hann er léttur at koyra, kraftar sera væl og hevur yvirskotskraft til at trekkja eitt hvørt tungt less. Bilurin kann síggjast og roynast hjá hjá VR Bilum við Hoyvíksvegin.